# Ballett fyri børn og ung



*Gentur A hjá hjá Havnar Fimleikafelag*

**Heldur enn at gera eitt vanligt køkutombola ella stuðilsrenning, valdu leiðararnir fyri gentuliði A at gera eitt balletskeið, so at onnur eisini fáa gangn av tiltakinum**

BALLETTSKEIÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú sunnudagin 9. mars og næsta sunnudag, 16. mars verður høvi hjá børnum og ungum at luttaka á einum ballettskeiði, sum venjararnir hjá Gentum A í Havnar Fimleikafelag, Gunn R. Joensen og Jóna Johannesen, fara at hava høvuðsábyrgdina av.

Tiltakið verður skipað sum eitt slag av stuðulstiltaki fyri at savna pening inn til felagið. Gunn Joensen sigur, at peningurin first og fremst er ætlaður estetiska gentuliðnum, Getur A hjá Havnar Fimleikafelag, men at felagið sum so sjálvandi fer at umsita peningin.

Skeiðini fara fram á høllini á Stórheyggi.

Hetta er so ein øðrvísi háttur at savna pening inn sum stuðul til eitt felag.

Heldur enn at gera eitt vanligt køkutombola ella stuðilsrenning, valdu vit at gera eitt balletskeið, so at onnur eisini fáa gangn av tiltakinum, sigur Gunn R. Joensen.

Genturnar sjálvar koma eisini at verða við í undirvísingini, so tær læra at læra frá sær. Tær skulu eisini framføra teirra egnu balletseriu ímillum tímarnar.

## Eisini hip-hop

Gunn R. Joensen og Jóna Johannesen hava báðar sum born gingið til ballet hjá Elsu Mariu Bærensen, og sum vaksin undirvísti Gunn børnum í ballet og ungum í hip-hop.

Somuleiðis hevur Gunn R. Joensen eisini koreograferað dansin í Lort í Býin, har fýra fimleikarar úr estetiska fimleikaliðnum, hon venur í Havnar Fimleikafelag, vóru við í sangleikinum.

Sum nakað nýtt hava vit ein ballettíma fyri børn heilt niður í 3-4 ár, sum annars ikki hava nakað serligt dansitilboð, sigur Gunn R. Joensen.

Eisini verða tímar fyri 5-6 ár, 7-9 ár, 10-12 ár, 13-15 ár.

Tey, sum eru eldri enn hetta verða tó ikki við sviðusoð.

Vit fara eisini at skipa fyri hip hop tíma fyri 14 ár og eldri, og ein tíma í modernaðum dansi fyri 16 ár og eldri, sigur Gunn R. Joensen, sum sjálv hevur dansað hip-hop fyri Lizzie og Coolio, meðan Jóna Johannesen tekur sær av modernaða dansinum.

Gentur A hjá Havnar Fimleikafelag fara at dansa teirra egnu ballettseriu ímillum tímarnar.



*Gunn R. Joensen er annar av venjarunum hjá Gentum A og fer, saman við Jónu Johannesen at undirvísa í ballett fyri børnum tveir teir komandi sunnudagarnar.*

| klokkan | 16 .mars | | kostnaður |
|---|---|---|---|
| 13-14.15 | 1 tími | Ballet 7-9 ár<br>Gentur A framføra | 80,- |
| 14-15.45 | 1½ tími | Ballet 10-12 ár<br>Gentur A framføra | 120,- |
| 16-17.30 | 1½ tími | Ballet 13-15 ár | 120,- |
| 18-19.30 | 1½ tími | Ballet/Moderna<br>16 ár og eldri | 120,- |

| klokkan | 9. mars | | kostnaður |
|---|---|---|---|
| 13-14.15 | 1 tími | Ballet 5-6 á<br>*Gentur A framføra* | 80 kr |
| 14-15.15 | 1 tími | Ballet 3-4 ár | 80 kr |
| 15.30-16.45 | 1 tími | Ballet 7-9 ár<br>*Gentur A framføra* | 80 kr |
| 17-19 | 2 tímar | Hip hop 14 ár og eldri | 140 kr |

Tilmelding fer fram hjá Gunn á tlf. 25 34 74